*P/F Varðin í Gøtu er ein fyritøka í støðugari menning Fyritøkan eigur og rekur trý pelagisk fiskifør og hevur umleið 50 fólk í starvi. Í umsitingini starvast fast 2 fólk - stjórin og eitt skrivstovufólk, men felagið arbeiðir í løtuni við at menna skrivstovuna og søkir í tí sambandi eftir*

# Umsitingarleiðara/skrivara

Starvið er sera fjølbroytt, og arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

**Uppgávur:**

- At verða við til saman við stjóranum og øðrum starvsfólki at uppbyggja eina vælvirkandi skrivstovu.
- At gera kvartals- og ársroknskap, gera fíggjarætlanir og útrokningar/framrokningar av ymsum slag og annars virka sum fíggjarligur ráðgevi hjá stjóra og nevnd í sambandi við framtíðar ætlanir.
- At leggja til rættis tilfar til fundir og virka sum skrivari á fundum við myndugleikar, fíggingarstovnar og onnur.
- At samskifta við teir marknaðir, sum selt verður til.
- At leggja til rættis dagligu uppgávurnar á skrivstovuni.
- At hava samskifti við peningastovnar um hendi.
- At hava samskifti við skipini um hendi.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú hevur royndir við skrivstovuarbeiði og ert sterkur á tí roknskaparliga/fíggjarliga økinum. Samstundis er tað eitt krav, at tú dugir at nýta tey mest vanligu telduforritini og annars hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti. Málsliga skalt tú duga væl at orða teg á føroyskum og enskum bæði í skrift og talu.

Sum persónur vænta vit, at tú ert ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og tú hevur lætt við at samstarva. Harafturat vænta vit, at tú er fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Av tí at størsti parturin av dagliga samskiftinum er um skip og fiskivinnu, mugu umsøkjarar við kunnleika til hesa vinnu hava ávísan fyrimun.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu arbeiðsgevara.

Umsóknir verða sendar skjótast gjørligt og í seinasta lagi hósdagin 20. september 2001 til: Virkisráðgeving Spf., Boks 26, 600 Saltangará. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigvør Lakså ella Símun Hammer á Virkisráðgeving, tlf. 449591. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Virkisráðgeving Spf**

Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðsku-/Umhvørvisskipanir
Heimasíða: http://www.konsult.fo

# Havnameistari

## søkist til Tvøroyrar havn

Umsøkjarin skal minst hava skiparaútbúgving.
Royndur leiðari hevur fyrimun.
Umsøkjarin skal kunna klára enska málið, bæði í skrift og talu.
Umsøkjarin skal duga at arbeiða við teldu.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir við prógvum skulu vera

**Tvøroyrar býráð**
FO-800 Tvøroyri

í hendi áðrenn 24. september 2001.
Merkið brævbjálvan »Havnameistari«.

# BMW 316i til sølu



10/96, koyrt 67000 km, el-sóltak, el-rútar, 17" sportsfelgur + píkadekk á felgum, svørt el-leðursetur.

**Tlf. 22 11 22**
carl@oilwind.fo



FAROE Law

# heimligar og altjóða loysnir

FAROE Law er føroysk advokatskrivstova, sum veitir løgfrøðiliga vinnuráðgeving og tænastur. Vit bjóða bæði heimligar og altjóða loysnir til

- føroyskar vinnufyritøkur, almennar fyritøkur, stovnar og kommunur
- útlendskar fyritøkur, sum hava virksemi í Føroyum ella hava vinnuligt samstarv við føroyingar
- føroyskar fyritøkur, sum hava ella ynskja at fáa í lag vinnuligt virksemi uttan fyri Føroyar.

FAROE Law veitir millum annað ráðgeving um

- altjóða sáttmálar
- byggiløgfrøði
- fígging
- keyp og sølu av vinnufyritøkum
- oljuløgfrøði
- skattaviðurskifti
- virðisbrævamarknað og prospektir

FAROE Law er deild hjá Dania Advokater A/S, sum hevur høvuðssæti í Danmark. Dania hevur advokatskrivstovur í Keypmannahavn, Svendborg, Nuuk og Moskva, sum veita ráðgeving innan øll øki, eitt nú altjóða vinnuvirksemi. Fyritøkan telur 90 starvsfólk.

FAROE Law samstarvar við stóru ensku og altjóða advokatfyritøkuna CMS Cameron McKenna, ið hevur deildir um allan heim. Hetta er ein stórur fyrimunur, tá føroyingar fara undir vinnuligt virksemi uttan fyri Føroyar.

FAROE Law fekk fasta manning 1. juli í ár, tá Eyðfinnur Jacobsen advokatur tók við starvinum sum leiðari av skrivstovuni. Hann er serkønur í skattligum viðurskiftum.

FAROE
LAW
Tinghúsvegur 14, 4. hædd
Postboks 1218 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 99 00 · Fax 35 99 01
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.dk



# Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs

Mánadagin 17.09. klokkan 17 handar Tórshavnar kommuna Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs í **Sjónleikarhúsinum.**

Øll hava atgongd.

**Tórshavnar Kommuna**

# Listaframsýning

## í Smiðjuni í Lítluvík

hjá
**Inge Nepper Bakmann**
og
**Vígdis Sigmundsdóttir**

Framsýningin er opin
frá 15.–19. september 2001
frá kl. 14.00–18.00

*Øll áhugað eru vælkomin*



**Vika 37 – 12. sept.**
Vinnaratøl: **01 - 12 - 19 - 23 - 37 - 43**

Eykatøl: **33 - 41**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **3.434.275,- kr.** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **54.714,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **4.404,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **134,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **43,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**BILLUTIR**



**ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR**

**F.A. BILLUTIR**
tlf. 421605 fax 421666

## VALUTAKURSIR

| | | 13.09.01 | Ultimo august |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 820,6500 | 812,6100 |
| Bretland | **Pund** | 1203,4400 | 1186,1700 |
| Týskland | **Markur** | 380,5700 | 380,7500 |
| Svøríki | **Króna** | 77,5200 | 78,1900 |
| Noreg | **Króna** | 93,2000 | 92,3100 |
| Frakland | **Frankur** | 113,4700 | 113,5300 |
| Belgia | **Frankur** | 18,4510 | 18,4600 |
| Sveits | **Frankur** | 494,9000 | 491,0500 |
| Holland | **Gyllin** | 337,7600 | 337,9200 |
| Italia | **Liri** | 0,3844 | 0,3846 |
| Finnland | **Markur** | 125,1900 | 125,2500 |
| Ísland | **Króna** | 8,2300 | 8,2500 |
| Eysturríki | **Skillingur** | 54,0930 | 54,1180 |
| Spania | **Pesetas** | 4,4740 | 4,4760 |
| Portugal | **Escudos** | 3,7130 | 3,7140 |
| Kanada | **Dollari** | 525,0600 | 526,6500 |
| Grikkaland | **Drakmur** | 2,1840 | 2,1850 |
| Japan | **Yen** | 6,8977 | 6,8483 |
| Írland | **Pund** | 945,1000 | 945,5500 |
| | **Evra** | 744,3300 | 744,6800 |

FØROYA SPARIKASSI

# KROSSORÐ



**Vinnari:**
*Beinta L. Rasmussen*
*á Frælsinum 8*
*100 Tórshavn*

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: GONGUSNAPSUR



## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn - og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**273**

Loysunarorðið: ..................

Navn: ..................

Bústaður: ..................

Bygd/býur: ..................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***